## Bara tunnur bukaðar um vikuskiftið

**Føstulávintsvikuskiftið hevur verið sera friðaligt kring lndið, hóast nógv fólk hevur verið úti, siga politistøðirnar frá**

POLITITÍÐINDI

Føroyingar eru sum heild friðaligt fólkaslag. Og føstulávintsvikuskiftið var einki undantak soleiðis. Fólk voru í býnum og hugnaðu sær, og tey høvdu tað gott og friðaligt, verður sagt frá løgregluni av størru støðunum.

Tað stóra tiltakið um vikuskiftið var Prix Føroyar umfarið í Fuglafirði. Har var heilt nógv fólk, verður sagt av politistøðini í Runavík. Men tað gekk alt friðaliga fyri seg, hóast onkur smávegis ósemja var í rúgvuni. Onkur varð tikin fyri at koyra fullur, sigur vakthavandi í Runavík.

Løgreglan í Runavík letur væl at hesum, at fólk í stóran mun eru farin at brúka bussar í samband við størri tiltøk sum eitt nú Prix Føroyar. Umframt at tað ger ferðsluna væl tryggari, ger tað eisini, at fólk spjaðast skjótari, eftir at tiltøkini eru liðug, og harvið minkar eisini vandin fyri slagmálum.

Eins og í Runavík letur politistøðin í Havn sera væl at vikuskiftinum. Ein bilførari varð tikin fyri rúsdrekkakoyring figgjakvøldið, og onkur hendinga ósemja var uttan fyri onkran av klubbunum um vikuskiftið. Annars var einki at tosa um, sigur vakthavandi í Havn við Sosialin.

Úr Klaksvík verður sagt, at heilt nógv fólk var í býnum, og tað gekk eisini heilt friðaliga fyri seg.

Tó hevur innbrot verið umborð á einum báti um vikuskiftið, har medisinkistan er brotin upp, og morfintablettir stolnar. Hetta er hent nakrar ferðir í seinastuni, sigur vakthavandi á politistøðini í Klaksvík.

# Vandi fyri verkfalli í fiskiflotanum

**Fekst eingin semja um nýggjan sáttmála fyri midnátt í gjárkvøldið, liggur fiskiflotin so hvørt, sum skipini koma inn. Eitt møguligt verkfall fer at raka tey fiskiskip, ið hava skiparar og stýrimenn, sum mynstra eftir sáttmála millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag**



*Hava vit semju ella verkfall í dag. Tað var ikki greitt, tá ið Sosialurin fór til prentingar í gjár. Myndin er tikin í Saltangará fríggjamorgunin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta mikukvøld vrakaðu bæði Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag, sum samráðast um nýggjan sáttmála, semingsuppskotið, sum semingsstovnurin legði fyri partarnar.

– Vit eru nú farnir til hús og fara ikki sjálvbodnir at kalla partarnar saman aftur til nýggjan fund. Fáa vit eina áheitan um at kalla partarnar saman aftur, gera vit tað.

So greið vóru boðini hjá Terja Sigurðssyni, semingsmanni, tá ið partarnir skiltust seinasta mikukvøld.

Hann ásannaði, at bæði feløgini stóðu so fast við síni krøv, at nyttuleyst var at halda fram.

– Tá ið hetta er støðan, er ikki nógv, sum vit kunnu gera, segði semingsmaðurin.

### Tímin nærkast

Fekst eingin semja um nýggjan sáttmála fyri midnátt í gjárkvøldið, liggur fiskiflotin so hvørt, sum skipini koma inn.

Eitt møguligt verkfall fer at raka tey fiskiskip, ið hava skiparar og stýrimenn, sum mynstra eftir sáttmála millum Føroya Skipara-og Navigatørfelag og Føroya Reiðarafelag. Hinvegin verða strandfaraskipini og farmaskipini ikki rakt av verkfalli í hesum umfari.

Formaðurin í FSN, Ellintur Abrahamsen, segði seg vænta, tá ið partarnir fóru hvør til sítt mikukvøldið, at ein nýggj semingsroynd fór at verða gjørd í gjár. Men skuldi ein nýggj roynd gerast í gjár, áðrenn tíðin rann út á midnátt, noyddust partarnir í sáttmálatrætuni at taka stig til at kalla semingsstovnin til fundar.

Sosialurin royndi fyrrapartin í gjár at fáa orð á formannin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag, men felagið hevði nevndarfund, og tí læt hetta seg ikki gera, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Vit fingu tó fatur á formanninum í Føroya Reiðarafelag, Jákupi Sólstein, sum eisini var staddur í Havnini, har felagið hevði fundarvirksemi, nú tíðin var um at renna út.

### Einki samband

– Nei, her er fyri so vítt einki í gongd í løtuni, og eingin avtala er gjørd um nýggjan fund, hvørki við FSN, ei heldur saman við semingsstovninum.

Jákup Sólstein segði seg ikki duga at meta um, hvørt partarnir fóru at tosa samanaftur í gjár, og hann hevði einki boð uppá, um hann væntaði nakra semju, áðrenn tíðin rann út á midnátt.

Bæði Ellintur Abrahamsen og Jákup Sólstein hava ásannað, at langt er millum partarnar, og tí var ógjørligt fyrrapartin í gjár at meta um útlitini fyri semju, soleiðis at eitt møguligt verkfall kundi umgangast.

– Einasta, sum vit hava hoyrt frá FSN seinastu dagarnar, er, at felagið hevur givið okkum nakrar konsekvensútrokningar í sambandi við ynski okkara um ætlaðu luttøkuna hjá limum FSN's í øktum oljuútreiðslum.

Jákup sigur, at í sáttmálanum millum Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, sum varð undirskrivaður fyrr í ár, er eitt sonevnt protokollat, sum sigur, at verða munandi hækkingar í oljuútreiðslunum, skulu feløgini samráðst um møguligt býtið av hesum útreiðslum.

– Vit halda, at yvirmenninir hava betur ráð at taka lut í hesum útreiðslum enn vanligi dekkarin, og tí ynskja vit eisini eina greiða avtalu um hesi viðurskifti við FSN.

Sum heild, skilst á formanninum í Føroya Reiðarafelag, at felagið ikki er nøgt við, at nýggi sáttmálin millum FR og FSN verður útreiðsluneutralur, tí hann heldur, at limirnir í FSN hava ráð at bera eitt sindur meira, enn maðurin á dekkinum hevur.

### Einki boð…

Jákup Sólstein segði seg fyrrapartin í gjár ikki duga at spáa um, hvørt feløgini framvegis fara at standa við ongum sáttmála á midnátt, soleiðis at verkfall verður í fiskiflotanum.

– Nevndin í FSN er treisk at samráðast við, og tað tykist tungt at vinna undir land. Men vit noyðast eisini at vera treiskir, soleiðis sum gongdin í stórum parti av fiskiflotanum er.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag heldur, at tað hevði verið nógv betur fyri samráðingarnar, um manningarfeløgini samráddust undir einum.

– Tað er næstan vónleyst at náa semju, tá ið neyðugt er at samráðst við fleiri partar um sáttmálan.

Jákup Sólstein helt fyrrapartin í gjár, at nógv skal bloytast millum feløgini, um tað skuldi eydnast at finna fram til semju fyri midnátt í gjárkvøldið.

Sosialurin royndi eisini at fáa fatur á semingsmanninum, Terja Sigurðsson, fyrrapartin í gjár, men tað eydnaðist okkum tíverri ikki.

Óvirkaður fiskur:

# Ein lýsing av útflutningsmynstrinum

**Sendistova Føroya í London hevur sum partur av sínum virksemi skrivað eina frágreiðing um útflutningin av óvirkaðum fiski úr Føroyum til Stóra Bretlands. Frágreiðingin, sum eisini roynir at svara nøkrum spurningum, verður løgd fram á almennum fundi á Hotel Hafnia hósdagin**

FRÁGREIÐING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv orðaskifti hevur seinastu árini verið um lutfalsliga stóra vøksturin í útflutningi av óvirkaðum toski og hýsu úr Føroyum til Stóra Bretlands.

John Rajani, sum er føroyskur sendimaður í London, sigur, at ymiskar áskoðanir eru um, hvør orsøkin er til hesa gongd, og hvørt hetta fyribrigdi er ein trupulleiki ella ikki.

– Sjónarmiðini eru ofta litaði av teimum áhugamálum, sum viðmerkjarin umboðar, og greitt er, at fiskimaðurin, virkiseigarin, verkafólk og politikarar ikki altíð hava somu áhugamál.

John sigur, at sum partur av virkseminum hevur Sendistova Føroya í London fylgt gongdini í fiskivinnuni í Stóra Bretlandi seinastu árini, og í hesum sambandi er nú ein frágreiðing skrivað

– Frágreiðingin lýsir føroyska útflutningsmynstrið, bæði hagtalsliga og við atliti til marknaðin. Ein viðgerð er av føroysku kappingarstøðuni, og mett verður um framtíðarútlit.

Hann heldur, at sum støðan er í løtuni, eru útlitini ikki serliga bjørt, og tí verður í frágreiðingini spurt, hvørji ráð eru til at taka?

– Frágreiðingin roynir at svara hesum spurningi og setir fram eina hugsjón, hvussu føroysk fiskivinna kann gerast betri kappingarfør. Ymisk viðurskifti verða lýst, sum eru ein fyritreyt fyri, at henda hugsjón kann gerast veruleiki, sigur John Rajani, sendimaður.

Frágreiðingin verður løgd fram á almennum fundi á Hotel Hafnia, hósdagin 10. februar klokkan 15.30.

Eftir framløguna verður høvið hjá fundarluttakarunum at seta spurningar.